Flytingarmynstur

Næmingabók, síða 13-18

Førleikar:

- At lesa einfaldar hagtalsmyndir og tabellir. At lesa størri, torskildari hagtalstilfar, umframt at samanbera ymisk hagtøl.
- At fremja samfelagsfrøðiligar kanningar, bæði av kvalitativum og kvantitativum slagi. At skilja, nær teir ymisku kanningarhættirnir eru hóskandi at brúka.
- At leita sær týðandi og álítandi vitan, bæði gjøgnum internetið og fysiskar miðlar. At nýta grundleggjandi keldukritikk.

Á Hagstovuni (hagstova.fo) er eina hagtalsgrunnur, ið nevnist "Innlendis flyting". Hann er at finna undir "Íbúgvar og val".

- Finn út av hvussu nógv fólk eru flutt úr øðrum bygdum til tína bygd.
- Finn síðani út av hvussu nógv fólk eru flutt úr øðrum kommunum til tína kommunu.
- Finn at enda út av hvussu nógv fólk eru flutt úr øðrum økjum til títt øki.

Tú kanst eisini samanseta leitingar, soleiðis at tú kannar hvussu nógv fólk eru flutt úr einum ávísum øki til eina ávísa bygd.

Til ber eisini at fáa heimasíðuna at tekna tølini sum grafar. Tá verða tølini týðiligari at lesa. (Sí niðanfyri)





	1985	1986	1987	1988	1989	1990	1991	1992	1993	1994	1995	1996	1997	1998	1999	2000	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018
Frá Suðurstreymoyar øki																																		
Til Norðstreymoyar øki	63	55	66	87	68	42	51	73	62	23	67	82	85	68	75	52	81	91	86	85	72	104	95	124	74	87	90	78	74	90	106	93	108	71